B68-KÍ 3-1 (0-1):

# Treiskir toftamenn settu føðingardagsbarnið upp á pláss

**Væl skipaða heimaliðið hevði størri tyngd og gjørdi sær dælt av, at klaksvíkingar enn eina ferð høvdu stórar trupulleikar av fløtu verjuni**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tað var intensivitetur og dramatikkur og undirhald fyri allar pengarnar, tá ið 99 ára føðingardagsbarnið úr Klaksvík við stórum og í 1. hálvleiki mælskum fylgi vitjaði á Svangaskarði, har heimaliðið spældi av øllum alvi fyri at varðveita møguleikan í hvussu so er at røkka Europa Cup plássi og eisini fyri at halda lív í vónini um, at tað skal eydnast at fáa HB aftur.

B68 legði bragdligari fyri. Teir vunnu flestu nærdystirnar, og hóast møguleikarnir ikki vóru so upplagdir beinanvegin, so lá tað líka sum í luftini, at tað fóru at verða teir, sum skuldu leggja seg framum.

Eftir lítlari løtu miðskeiðis í 1. hálvleiki snaraðist dystargongdin heilt á. KÍ skoraði upp á brotsspark, og seinnapartin av fyrra umfarinum vóru klaksvíkingar eina tonn omaná. Teir høvdu eisini møguleikan at leggja seg uppaftur betri fyri, men Albert Sævarsson tveitti seg niður ímóti handaru stólparótini og stórbjargaði stútaranum hjá annars sera væl spælandi Atla Danielsen, sum í hesum førinum ikki fekk heilt tak á innlegginum frá Arnoldi Joensen.

Eingin ivi var um brotssparkið, sum stóðst av einasta stóra mistakinum í B68 verjuni. Vandin var lítil ella eingin, tá ið Hans Fróði Hansen, sum annars var ein brandur í miðverjuni, tøvdi eitt sindur og í staðin fyri at skumpa bóltin út av vøllinum í høgru royndi at snýta Eyðun Klakstein. Tað miseydnaðist, Eyðun setti ferð á inn í brotsteigin, eingin ivi var um, at tað var brotssparkið, sum hann ætlaði sær, og tað eydnaðist. Eyðun fór um koll stutt innanfyri brotsteigarmarkið, dómarin bríkslaði, og Jan Andreasen sendi málverjan í annað borðið og bóltin dygst inn við stólparótini í hinum borðinum.

## KÍ trupulleikar í verjuspælinum

Beinanvegin í seinna umfarinum sást, at B68 var sinnað at leggja meiri fyri í royndunum at fáa mál. Tryggu verjuspælararnir skiftust um at fara fram við í álop, og B68 yvirtakið á miðvøllinum gjørdist alt størri. Fróði Benjaminsen og Jann Ingi Petersen fingu eisini hjálp frá Boga Petersen og Øssuri Hansen. KÍ var sera álopssinnað í útgangsstøðu. Arnold Joensen og Eyðun Klakstein vóru meiri vongspælarar í 4–2–4 spælskipan enn miðvallarar í 4–4–2 skipan, og harvið var bitin hjá Atla Danielsen og Jan Joensen á sentralu plássunum ov stórur.

Klaksvíkingar gjørdu tað eisini torført hjá sær sjálvum. Teir lyftu ofta bóltin frameftir. B68 var nógv stinnari í luftspælinum, og eftir steðgin royndu teir at flyta heilt fløtu verjuna langt fram á vøllin. Sum fleiri aðrar ferðir fyrr í ár knípti tað heilt nógv við uppbakkingini, og tað dugdi B68 liðið væl at fáa nyttu burturúr.

Á tímaslagnum javnaði Fróði Benjaminsen, sum taldist millum teir bestu, til 1–1. Eftir einfalt eitt tvey samanspæl tíggju metrar frammanfyri miðstrikuna gjørdist hann púra leysur við KÍ málverjanum. Landsliðsmaðurin sneiddi hegnisliga framvið málverjanum, trillaði bóltin í tóma málið, og so vóru greiðar ábendingar um, at síðsti hálvi tímin fór at vera sera torførur hjá KÍ.

Eitt lítið korter seinni skoraði B68 tvey mál og so var greitt í hvønn posa stigini skuldu fara. Í báðum førunum vóru toftamenn púra leysir við KÍ málverjanum, tá ið teir skoraðu. Klaksvíkingarnir vildu hava, at serliga í 2. hálvleiki sera væl upplagdi John Heri Dam skuldi vera rangstaddur í báðum førunum, men linjuverjin og dómarin lótu spælið halda fram, og so var Kartin Joensen prísgivin. Í fyrra førinum trillaði John Heri bóltin upp á tvørs til raska Jann Inga Petersen, og í seinna førinum smekkaði John Heri flatt til úr sekstan metrum, eftir at Albert Sævarsson hevði sparkað langt út, og bólturin hevði snittað ein á vegnum.

B68 spælararnir stórfegnaðust, og KÍ spælararnir vóru vónbrotnir. Breiddin, tyngdin, dýpdin og organisatiónin í verjuspælinum vóru í longdini betri hjá heimaliðnum, sum framvegis hevur møguleika at vinna FM. Setningurin hjá KÍ verður nú at halda seg omanfyri miðstrikuna, og næsta sunnudag fáa teir á heimavølli ímóti B36 møguleika at vísa, at tað kann verða betri, enn tað so mangan hevur verið í ár, og enn tað serliga í 2. hálvleiki var á Svangaskarði.



*Tað var dramatikkur fyri allar pengarnar, tá heimaliðið spældi fyri gullmøguleikanum móti føðingardagsbarninum úr Klaksvík*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*KÍ gjørdi uppgávuna óneyðuga trupla, tá teir í stóran mun bara lyftu niðan eftir vøllinum, heldur enn at nýta leikligu dygdirnar á liðnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dysturin í tølum

**B68–KÍ 3–1 (0–1)**
0–1: Jan Andreasen br 22.
1–1: Fróði Benjaminsen 61.
2–1: Jann Ingi Petersen 73.
3–1: John Heri Dam 74.
Dómari: Dagfinn Olsen
**B68:** Albert Sævarsson – Dánial Hansen, Hans Fróði Hansen, Arnbjørn Danielsen, Jákup Eli Olsen – Bogi Petersen (Eyðstein Skipanes, 60.), Jann Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen – Súni Fríði Johannesen (Jóhan Petur Poulsen 10./Øssur Jacobsen 77.), John Heri Dam
**Gult kort:** Øssur Jacobsen 82.
**KÍ:** Kartin Joensen – Jan Andreasen, Allan Joensen, Aleksander Djordjevic, Harley Bertholdsen – Arnold Joensen, Atli Danielsen, Jan Joensen (Leon Bjartalíð, 76.), Eyðun Klakstein (Símun Joensen, 60.) – Jacob Bymar, Hjalgrím Elttør (Marius Nyström Hansen, 80.)
**Gult kort:** Eyðun Klakstein 40., Jan Joensen 65.



B36-Skála 2-1 (2-1):

# Linligur sigur

**B36 spruttaði fyrstu løtuna, men tá Skála minkaði um munin, fór luftin fullkomuliga úr heimaliðnum, sum tó ikki mundi kenna sigurin hóttan**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tá B36 í fyrru kappingarhálvu vann á Skála, var hetta samstundis byrjanin til ein langan spurt, sum tók liðið upp á oddasessin í deildini. Tað ferðin var talan um ein dyst, sum var av tí heldur keðiliga slagnum, men har stigini høvdu størstan týdning, og í so máta var talan um eina líknandi uppliving í Gundadali sunnudagin.

## Ein perla avgjørdi

Leikliga var dysturin nevniliga als ikki upplivilsi. Fyrstu løtuna var kanska eitt sindur av lívi í áskoðarafjøldini hjá heimaliðnum, sum sá hvítklædda liðið spæla seg fram til eina fleiri málmøguleikar, og sum tvær ferðir innan fyrsta lítla korterið eisini megnaði at gera sær dælt av hesum.

Fyrru ferðina vóru skálamenn tó ónøgdir um, at dómarin ikki bríkslaði fyri frísparki, tá Jákup á Borg ótilvitað nýtti hondina at fáa tamarhald á bóltinum. Tá skálamenn bíðaðu, og dómarin tagdi, gjørdi landsliðsmaðurin tó bart, og so var B36 á odda.

Hetta tóktist tó bara vera startskotið hjá B36, og løtu seinni var bólturin aftur í Skála-málinum, og hesa ferð var tað eingin, sum kundi mótmæla. Allan Mørkøre sendi diagonalt til John Petersen, sum var staddur nakað yviri í vinstra borði, og so kundu gestirnir bara hyggja at, meðan skálamaðurin fyrst lyfti bólti upp um verjuleikara, áðrenn hann við einum dómadagsskoti fluktaði bóltin í kassan, uttan at Skála-málverjin hevði nakran sum helst møguleika at verja fyri.

Uttan iva var hetta dagsins detalja í dystinum, og spurningurin er so, um áskoðararnir fingu so øgiliga nógv annað fyri pengingin. B36 royndi næstu løtuna at trýsta, men um miðjan hálvleikin fekk Skála aftur skapt nakað av spenningi í dystin.

Alexander Johansen vann sær brotsspark í nærdysti við Fróða Clementsen, og hóast tað nú vóru havnarmenninir, sum mótmæltu, so hjálpti hetta lítið. Brotssparkið sendi Iulian Florescu trygt í netið, og so kundi ein kanska hildið, at meira lív kom í dystin, men so varð ikki. Als ikki.

## Leyst krút fyri restina

B36 fánaði at kalla burtur. Kanska í óttanum fyri einum eyðmýkjandi stigamissi, og tó at Skála í nógvum lutum spældi skilagott og væl skipað, so restaði teimum broddin, sum veruliga kundi hótta B36.

Onkrir málmøguleikar komu tó tað, sum eftir var av dystinum, og millum annað kundi Jákup á Borg avgjørt, tá hann hevði góðan møguleika at stúta, men tað gjørdist tó av ongum. Hjá Skála komu vandamestu støðurnar við deyðbóltum, og tað undirstrikar kanska trupulleikan, sum liðið hevur at spæla seg fram til veruligar málmøguleikar. Ein trupulleiki, sum meira enn nakað annað tykist skula kosta teimum sætið í bestu deildini, tá kappingarárið er runnið. At so ein tann vandamesti álopsleikarin í føroyskum fótbólti er skálamaður, og at hesin við einari perlu var tungan á vágskálini sunnudagin, man vera lagnunnar speisemi í so máta.

At liðið so eisini fekk ein annan trupulleika undan dystinum, tá Eugen Voda datt á súkklu síni, og soleiðis ikki fekk vart málið sunnudagin, er ein onnur søga, men hon er neyvan viðvirkandi til at betra møguleikarnar hjá liðnum at standa seg í kappingini um at sleppa av botnsessinum.

Hjá B36 er støðan í so máta nakað hugaligari. Hóast alt, so er liðið framvegis á heiðursmerkjaplássum, men vónirnar undan árinum vóru tó til væl meira enn tað. Enn livir seinasta vónin um, at tað kanska kann eydnast at taka grannarnar úr HB aftur. Men so krevst fyrst og fremst, at HB snávar í onkrum av sínum uppgerðum umframt teirri móti B36, og hartil skal spælið hjá B36 helst lyftast eina tonn ella tvær, um teir skulu gera sær vónir at fáa fulla úrtøku í truplu útidystunum, sum enn standa á skránni.

### Dysturin í tølum

***B36-Skála 2-1 (2-1)***
1-0: Jákup á Borg, 6
2-0: John Petersen, 12
2-1: Iulian Florescu, 14 (br.)

**Dómari:** Lassin Isaksen

**B36:** Tróndur Vatnhamar – Allan Mørkøre, Fróði Clementsen, Rúni Elttør, Kenneth Jacobsen – Klæmint Matras, Jens Kristian Hansen, Niels Joensen – Jákup á Borg, John Petersen, Heðin á Lakjuni.

**Skála:** Heini Kristiansen – Arnhold Berg, Ronnie Hansen, Dusan Jaic, Iulian Florescu – Alexander Jovevic, Sveinur Justinussen, Pauli Hansen, Hanus Thorleifsson – Alexander Johansen, Jonhard Frederiksberg.




*John Petersen skoraði eina sannu perlu av einum máli sunnudagin, men so er eisini tað mesta sagt um dystin*

